# Føroyar í fokus í London



*London er ein av heimsins fremstu fíggingardeplum – higani skulu framtíðar íløgupengar koma til føroyska samfelagið*

**Føroyar og føroyskt vinnulív kunnu vera góður karmur hjá útlendskum fyritøkum at gera íløgur í. Ein komandi oljuvinna og eisini privatisering av fleiri almennum føroyskum fyritøkum eiga at kunna draga útlendskar íleggjarar til landið. Hetta er orsøkin til, at tað verður skipað fyri stórum kunningardegi um Føroyar í einum av heimsins leiðandi fíggingardeplum, London**

ÍLØGUHUGUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Um góðar tríggjar vikur verður av álvara fokus sett á Føroyar og føroyskt vinnulív í einum av størstu fíggjardeplunum í heiminum, nevniliga enska høvuðsstaðnum London. Tá fer føroyska sendistovan í býnum saman við áhuga-málum í Føroyum og í Bretlandi at bjóða Føroyar fram sum framtíðar íløgulandið í heiminum.

Tað eru føroyska sendistovan og oljufelagið Faroe Petroleum, sum skipa fyri kunningardegnum í London. John Rajani, sum hevur verið á sendistovuni, síðani hon lat upp fyri nøkrum árum síðani, stendur fyri fyrireikingunum. Hann sigur, at ætlanin við degnum er serstakliga at kunna um møguleikarnar fyri at gera íløgur í Føroyum. Her verður so serstakliga sett fokus á eina komandi oljuvinnu. Tað er serliga hon, sum kann draga íleggjarar og onnur til slíkan føroyskan kunningardag. –Vit egna við oljuni, men tað snýr seg sjálvandi um so nógv onnur viðurskifti eisini sigur John Rajani. Roknað verður við, at nógv umboð fyri føroyskar fyritøkur eisini fara at vera við til tiltakið, og á odda verður so sjálvur fíggjarmálaráðharrin, Bárður Nielsen, sum fer at tosa um Føroyar sum framtíðar íløguland.

Har verða so eisini tvær framløgur um oljuvinnuna. Sigurd í Jákupsstovu, stjóri í Oljufyrisitingini fer at greiða frá oljutilgongdini. Somuleiðis fer ein av oddamonnunum í Faroe Petroleum, fuglfirðingurin Graham Stewart at tosa um hetta føroyska oljufelagið, sum er virkið í Føroyum men sum eisini hevur fingið fótin fastan í Bretlandi. Eitt nú hava stór íløgufeløg í Bretlandi víst Faroe Petroleum stóran ans og áhuga. Uppgávan hjá honum verður m.a. at vísa á, hvussu tað hevur borið til hjá útlendskum íleggjarum at gera íløgur í Føroyum og blíva ein týðandi partur av eini komandi oljutilgongd.

Roknað verður við stórari luttøku skilur Sosialurin. Innbjóðingar eru sendar til nógvar fyritøkur í Bretlandi, eitt nú analytikarar á partafelagsmarknaðinum og eisini analytikarar sum heild, til íløgufeløg og ikki minst til teir miðlarnar, sum skriva um vinnu og fígging. Somuleiðis eru stór feløg í Føroyum boðin við, feløg sum Notio, Framtaksgrunnurin og onnur feløg. Eisini íslendskar íløgufyritøkur og bankar, sum hava skrivstovur í London, og sum hava og kunnu hugsast at hava áhuga fyri at gera íløgur í Føroyum, eru bodnar við.

Talan verður tí um at skapa sambond millum týðandi fyritøkur í Føroyum og útlendsk áhugamál, sum kunnu hugsast at vilja gera íløgur í Føroyum í framtíðini.

Á kunningardegnum fer at verða greitt frá, hvørjar ætlanir føroyska vinnan og ikki minst landsstýrið hevur, her eitt nú í sambandi við at privatisera fyritøkur. Roknað verður kanska ikki við nøkrum beinleiðis úrslitum her og nú men hugsað verður um at byggja brýr og skapa sambond. Men hetta verður so gjørt fyri at siga frá, at Føroyar eru til, og at her kunnu vera á vinnugreinar, sum kunnu vera áhugaverdar at gera íløgur í.

Tiltakið verður gjørt í samstarvi við Faroe Petroleum, har nakrar av teirra kontaktum verða bruktar, og verða teir eisini brúktir til at siga frá, hvussu teir hava borið seg at sum føroyskt felag at fáa útlendingar at gera íløgur í eitt nú eina komandi føroyska oljuleiting.

Tað hevur nógv at siga, at eitt felag sum hevur klárað seg væl í Føroyum, kann siga øðrum frá, hvussu man hevur borið seg at. At tað hevur riggað. Tað skapar eisini álit um, at her eru møguleikar, og at tað ber til.

### Skapa áhuga fyri Føroyum

John Rajani á føroysku sendistovuni í London sigur, at teirra uppgáva er at skapa áhuga fyri Føroyum sum heild og ikki minst fyri vinnumøguleikum í Føroyum. At tað er tørvur á at fáa útlendingar at gera íløgur í Føroyum. Og at man politiskt er áhugaður í tí, og at man sær tað sum nakað gott. Slíkur kunningarfundur og samkoma kann vera ein av mátunum at gera tað uppá.

Uppá fyrispurning hví London er valt til endamálið sigur John Rajani, at tað er m.a. tí at vit hava sendistovu har og tí býurin er ein fíggjarmiðdepil. Eis-



*Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri fer at greiða altjóða íleggjarum frá Føroyum sum framtíðar íløguland*



*John Rajani hevur úr at gera á sendistovuni í London at fyrireika eitt tað størsta tiltakið nakrantíð í útheiminum at fáa íleggjarar at vísa áhuga fyri Føroyum*



*Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum, hevur megnað at draga nógvan útlendskan íløgukapital til felagið og skal hann á kunningarfundinum í London greiða frá, hvussu hetta hevur hepnast*